# Montørur til FT Samskifti

"Skifta vit ikki kós, enda vit helst har, vit stýra!"

Kinesiskt orðatak



**Søkt verður eftir montøri til Tænastudeildina á FT Samskifti í Tórshavn at byrja skótast gjørligt. Arbeiðið er í stóran mun nýgerð, brekrætting og viðlíkahald av telefoninstallatiónum.**

**Vít kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiði sum umfatar:**

- Nýgerð, brekrætting og viðlíkahald av telefoninstallatiónum
- Vanliga telefonútgerð
- Vekslarar
- Innanhýsis kaðalskipanir
- Terminalar av ymiskum slag
- Internet, ISDN og ADSL
- At ráðgeva viðskiftafólk um felagaútgerð og tænastur.

**Útbúgving:**
Elektronikkmekanikari, elektrikari, líknandi útbúgving og/ella hollar royndir sum montør/kaðalmaður.

Tann ið sett/-ur verður, má kunna arbeiða sjálvstøðugt, verða opin og duga væl at samstarva og tosa við viðskiftafólk og hava royndir innan EDV á brúkarastøði

Uppmøtingarstaður er Klingran í Hoyvík og arbeitt verður í øllum Miðøkinum, tvs. Tórshavn, Norðstreymoy, Vágum og Sandoy

Starvið er lønt sambært sattmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Áhugað kunnu venda sær til Bjørn M. Mortensen, bólkaleiðara ella Hjallgrím Hentze, depilsleiðara á tlf. 30 30 30.

Umsóknir skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 19. mai 2006 og skulu sendast til

**Føroya Tele**
**Starvsfólkadeildin**
**Postrúm 27**
**110 Tórshavn**

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-økið og øll støðarúgerð fyri fastnettelefoni og breiðbandi.
Í felagnum starvast 110 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.



# Bilverkstaður til sølu



Bilverkstaðið hjá P/F Mogens Petersen á Tvøroyri er til sølu.

Bygningurin er partvís í tveimum hæddum. Í stovuhæddini er verkstaður, sum er umleið 400m2 og handil, sum er umleið 160 m2.

Í ovaru hæddini eru sethús, sum eru 144 m2.

Bilverkstatðið kann gera umvælingar av øllum bilum, stórum og smáum, og hevur eisini sproytirúm.

Bygningurin er frá 1978, og er í góðum standi. Handilin er nýliga umvældur. Grundøkið er 1432m2.

Partafelagið hevur avtalu við P/F Føroya Shell um oljusølu.

Áhugaðir keyparar kunnu venda sær til:

**Suðuroyar Bókhaldsvirki sp/f**
**Fo 950 Porkeri**
**Tlf. 373667**



# EINGIN FORÐING

***Ráðstevna um rehabilitering við varðandi sjúku og/ella breki***

mbf

*Í sambandi við, at MBF fyllir 25 ár í ár, verður skipað fyri ráðstevnu í Norðurlandahúsinum tann 15. mai 2006*

*Skrá*

| | |
|---|---|
| 8.30-9.10 | Morgundrekka |
| 9.10-9.25 | Góðan Morgun |
| 9.25-9.35 | Vælkoma og kunning. Leila Solmunde, formaður í MBF |
| 9.35--9.40 | Ráðstevnan verður sett. Landstýrismaðurin í almannna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm |
| 9.40-10.00 | Allýsing av hugtakinum "Rehabilitering" Gunner Gamborg, formaður í danska Ergoterapeutfelagnum |
| 10.00-10.30 | Leikluturin hjá sjúkrahúsverkinum fyri einari vælvirkandi rehabiliteringsskipan Marin Vang, Sjúkraröktarstjóri á Landssjúkrahúsinum |
| 10.30-10.50 | Kaffi |
| 10.50-11.20 | Samskipan millum primer- og sekundera almenna- og heilsuverkið í sambandi við rehabilitering við varðandi sjúku. Carsten Hendriksen, lektor og dr. med. |
| 11.20-11.50 | Rehabilitering út frá einum brúkarasjónarhornið Lars Ødegaard, aðalstjóri í Norska Handikapfelagnum, NHF |
| 11.50-12.50 | Matarsteðgur |
| 12.50-13.10 | Rørsla / Tónleikur |
| 13.10-13.30 | Visjón 2015 og rehabilitering. Hvussu kann ein rehabiliteringsskipan setast í verk í Føroyum, og hvussu kunnu land og kommunur samstarva á hesum økinum. Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður |
| 13.30-13.50 | Leikluturin hjá kommununum í eini vælvirkandi rehabiliteringsskipan. Hvussu kunnu land og kommunur samstarva á hesum øki. Rósa Samuelsen, formaður í Føroya Kommunufelag |
| 13.50-14.15 | Hvørji krøv verða sett samfelagnum, um ein vælvirkandi rehabiliteringsskipan skal eydnast Gunner Gamborg, formaður í danska Ergoterapeutfelagnum |
| 14.15-14.30 | Kaffi |
| 14.30-15.45 | Panel við dagsins luttakarum: Hvussu koma vit víðari? |
| 15.45-16.00 | Samanutøka |

*Ráðstevnan hevur eitt tvørfakligt og tvørsektorielt sjónarhorn, har støðið verður tikið í brúkarinum*

*Ráðstevanan er almenn, men vendir sær serliga til fakfólk, lands- og kommunalpolitikarar, umsitingar og onnur áhugaði*

*Ráðstevnan er ókeypis, tilmelding á tlf. 317373 ella teldupost adr.: mbf@mbf.fo í seinasta lagi tann 8. mai 2006*